# Leiðin úr munninum í vesikummuna







*Á forsíðuni er ein tunga – sum bæði sær út og kennist sum ein verulig tunga. Her byrjar ferðin gjøgnum sodningarleiðina í kroppinum...*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

*Ferðin gjøgnum sodningarleiðina endar á vesinum við prumpi, kjumsi og øllum, ið hartil hoyrir...*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út eini heilt øðrvísi lívfrøðibók um sodningarleiðina. Sera vælegnað til tey smáu**

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*
eirikur@sosialurin.fo

Tyggi skrykki rumbli kjumsbókin er als ikki ein vanlig bók, men hon minnir kortini um aðrar bøkur, sum bókadeildin hevur givið út, eitt nú bókin við húsinum hjá Malju, har nógvir klaffar av ymsum slag eru at lata upp. Hesaferð er so nógv annað spennandi.

Á forsíðuni er ein tunga, sum líkist og kennist sum ein verulig tunga – og harvið byrjar leiðin gjøgnum sodningarleiðina. Har fáa vit eisini mangt og hvat at vita um, hvussu ferðin byrjar, tá ið tú hevur stungið okkurt leskiligt í munnin. Farið verður ikki fram við mýkindum, men alt verður lagt opið fram um spýtt og slev, um at pissa og prumpa og spýggja.

Á síðsta uppslagnum eru vit á vesinum – alt sum kemur inn skal eisini útaftur – og tí endar ferðin á vesinum, har ferðin gjøgnum sodningarleiðina endar við prumpi og kjumsi og øllum tí, sum hartil hoyrir.

Bókadeild Føroya Lærarafelag sigur um hesa útgávuna, at talan ikki er um eina lívfrøðibók, sum vit kenna frá dagsins skúla, men eina stuttliga lívfrøðibók, sum er um sodningarleiðina.

Bókin er ógvuliga kynstriga sniðgivin. Og sjálvt um hon kanska sær sjálv út, sum meira at kalla sær út, sum ein tú bara kanst stuttleika tær við, so eru upplýsingarnir í bókini á høgum stigi.

Útgevarin hevur lagt seg eftir at gera eina bók um eitt evni, sum børn mangan sita og suffa uppiyvir, á ein tílíkan hátt, at tú gerst klókari og hevur tað stuttligt samstundis.

Hon er góð hjálp hjá t. d. lærara, sum kann brúka hana í undirvísing, og hon er eisini stuttlig og lærandi at hava heima við hús.

Her verður ikki farið fram við mýkindum, men alt lagt opið fram um spýtt og slev, um at pissa og prumpa og spýggja. Og sjálvandi: tað, sum kemur inn, skal eisini út aftur, so vit enda á vesinum, sitandi á kummuni.

Tá ið vit hava fingið øll tey góðu evnini okkum tørvar, so trýsta vit leivdirna út aftur. Pums!

Beinta Johannesen hevur týtt bókina, sum er ein kleimin og klistrut klaffabók um sodningarleiðina.

Hon kostar 165 kr og er sera væl egnað sum stuttlig jólagáva.

**Ford Ranger til sølu**




Árg. 2003, 2.5 diesel.
Koyrt 64.000 km.

**Tlf. 211386 ella 371386**

## Sjálvstýrisflokkurin brynjar seg til løgtingsvalið

**Av teimum sjey, sum stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin í Streymoynni, hava tvey umboðað Fólkaflokkin á tingi og ein Javnaðarflokkin**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
eirikur@sosialurin.fo



*Mynd: Kári Petersen hevur verið trúgvur á javnaðarlistanum í nógv ár. Hann hevur eisini fleiri ferðir havt sæti á tingi. Nú ætlar hann sær á ting fyri Sjálvstýrisflokkin*

Listin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Streymoynni til løgtingsvalið komandi er eitt týðuligt boð um, at fólk skifta flokk. Á listanum eru Rúna Sivertsen, sum hevur umboðað Fólkaflokkin á tingi í seks ár, og Heðin D. Poulsen, sum onkur skifti hevur verið varamaður hjá Fólkaflokkinum á tingi.

Umframt tey bæði, so er eisini Kári Petersen, búskaparfrøðingur, eisini á listanum. Hann hevur verið trúgvur á Javnaðarlistanum í nógv á – og hann hevur fleiri skifti verið varamaður á tingi fyri Thomas Arabo – serliga í valskeiðinum frá 1984-88.

Til komandi løgtingsval verður bara ein listi hjá hvørjum flokki, nú Føroyar eru eitt valdømi. Valevnini, sum valfeløgini hjá Sjálvstýrisflokkinum í Surðurstreymoy og Norðurstreymoy mæla til at stilla upp á listanum, eru hesi:

Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur í Havn
Kári á Rógvi, lógkønur í Havn
Kári Petersen, búskaparfrøðingur í Havn
Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna
Ronald Poulsen, byggifrøðingur í Havn
Rúna Sivertsen, miðlafólk í Streymnesi
Súsanna Mortensen, rektari í Havn

Afturat hesum koma møguliga onnur valevni úr Streymoynni umframt úr hinum oyggjunum.

Endaliga uppstillingin hjá Sjálvstýrisflokkinum verður avgreidd á landsumfatandi uppstillingarfundi.

**RUKO LÁSATÆNASTA**
Ruko



• Umleggja alt til sama lykil
• Vit kopiera lyklar
• Útvega allar lásakassar
• Útvega lásasystem

Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ • TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20